# ítróttur

Nr. 232 • Fríggjadagur • 2. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Einki FS Suðuroy á hesum sinni

**Í Suðuroynni hava fótbóltsfeløgini tosað um eina samanlegging av øllum fýra feløgunum. Fyribils eru tankarnir tó parkeraðir**

**FS SUÐUROY**
*Jákup Mørk*



*Fótbóltsfeløgini í Suðuroynni hava tosað ítøkiliga saman um samstarv. Men enn verða tankarnir ikki til veruleiki*

Eftir at VB á eykaaðalfundi broytti støðu viðvíkjandi einum samstarvi við sumbingar, hava tingingar um hetta aftur verið á skránni. Tað hava tó ikki bara verið nevndirnar í Sumba og VB, sum hava verið partur av hesum kjaki.

John Henrik Holm, formaður í VB, váttar fyri Sosialinum, at arbeitt hevur verið við eini ætlan um felagssamstarvi fyri alla oynna.

- Tað verður tó ikki á hesum sinni, at hetta verður veruleiki. Vit hava verið í samband við bæði TB og Royn, men TB hevur so boðað frá, at teir í løtuni ikki vilja verða partur av hesum samstarvinum. Málið er tó ikki kastað burtur á nakran hátt, og sum so vóru tvøramenn positivir mótvegis hugskotinum. Men í løtuni verður ikki mett, at tíðin er búgvin til hetta stigið, staðfestir John Henrik Holm.

**Tankin má búnast**

Og júst hetta er eisini tað, sum formaðurin í TB hevur at siga um málið.

- Tað eru so nógvir spurningar, sum stinga seg upp í einum slíkum samstarvi, og tí vildu vit ikki bara loypa upp í hetta uttan víðari. Eitt nú vita vit als ikki, hvørt vit hava møguleika at spæla dyst í Formula-deildini her komandi ár, sigur Sofus Laðanberg, formaður í TB.

Við hesum vísir hann á, at vøllurin við Sevmýri neyvan hevði fingið góðkenning, um liðið aftur skuldi verið í fremstu deildini, og enn er ikki greitt, hvørt talan verður um nýggjan vøll í Trongisvági, soleiðis sum tað annars hevur verið tosað um.

- Ikki tí. Kommunan hevur altíð sýnt eina øgiliga vælvild, tá um ræður ítróttin her á staðnum. Men tað er ikki løtuverk at gera ein nýggjan vøll.

Men er hetta so nakað, sum tit fara at arbeiða víðari við í framtíðini?

- Tað er lítið at ivast í, at rákið verður tann vegin. Tað haldi eg, at bæði vágbingar og tvørafólk skilja. Men talan er samstundis um eitt eymt mál, og tí vilja vit heldur hava ein dialog koyrandi komandi árið. Tá búnast tankin kanska eisini meira, og so mugu vit síggja, hvussu støðan hjá okkum verður til ta tíð, heldur altso TB-formaðurin.

# Burtur við kappingarelementinum

Danska fótbóltssambandið, DBU, hevur gjørt av at innføra nýggjar reglur um ungdómsfótbólt. Í øllum førum, tá talan er um børn upp til 12 ára aldur.

Størsta broytingin er helst, at talan ikki longur verður um nakra DM-kapping. Ístaðin verður talan um fleiri vikuskiftis-stevnur kring alt landið, har stórur dentur verður lagdur á sosialu samveruna og stuttleikan við fótbóltinum.

Í frágreiðing til broytingarnar staðfestir DBU, at teir við hesum vilja steðga miðvísu »úrslita-hugsanini« sum í alt ov stóran mun ger seg galdandi í yngstu aldursbólkunum.

- Tað skal vera líðugt við smáum børnum á stórum vøllum. Líðugt við venjarum, sum bara hugsa um úrslit. Líðugt við »fiskaríi« av spælarum á yngru liðum. Líðugt við geylandi foreldrum á síðulinjuni. Í framtíðini skal barna- og ungdómsfótbóltur spælast eftir fortreytunum hjá børnunum. Hesi skulu hava vøllir og bóltar, sum hóska til teirra støðd, og so vítt, sum tað yvir høvur er gjørligt, skal fótbólturin hjá teimum yngstu verða eitt spæl, heldur enn kapping.

Soleiðis ljóðar partur av frágreiðingini, sum liggur handan broytingarnar. Stórur dentur verður nú lagdur á, at smærri fótbóltsvøllir verða lagdir kring alt Danmark, soleiðis sum vit eisini hava sæð tað her í Føroyum við nýggju sparkivøllunum. Enn er stigið tó ikki tikið fult út her heima, men tað eru helst fleiri, sum halda, at royndir við hesum væl kundu verið gjørdar.

Endamálið er fyrst og fremst at styrkja um breiddina, sum fótbólturin hevur. Hartil er eisini ætlanin, at børn í yngstu árgangunum hava ein størri tørv á at læra tekniskar dygdir við bóltinum, heldur enn at læra seg harða vinnaramentalitetin á so ungum árum. Við smærri vøllum verður talan eisini um fleiri bóltrøringar hjá hvørjum einstøkum spælara, og bara hetta í sjálvum eigur eisini at geva úrslit, verður sagt í frágreiðingini.

**-mørk**

## Ungur runavíkingur skrivað sáttmála

Bogi Løkin og NSÍ hava í vikuni skrivað undir sáttmála, sum bindur partarnar næsta árið.

Bara eftirnavnið sjálvt hevur ein serstakan klang í føroyskum fótbólti. Tað man heldur ikki vera nakað at ivast í, at runavíkingar vóna, at Bogi kann gera eins stórar skreytir, sum pápin í síni tíð gjørdi, men minni fær eisini gjørt tað.

Í ár hevur Bogi av álvara snoddað at besta liðnum hjá NSÍ, eins og hann eisini var ein týðandi partur av liðnum, sum vann FM-gull í unglingadeildini.

**-mørk**

## Lutakast hjá yngru landsliðunum

Lutakastið til komandi EM-undankappingarnar hjá føroysku U-17 og -19 landsliðunum hevur nú verið.

U-17 landsliðið er í komandi kappingin í bólki við Norðurírlandi, Sveis og Cypros.

Mótstøðuliðini hjá U-19 liðnum eru á pappírinum nakað sterkari. Svøríki, Pólland og Ísland eru í føroyska bólkinum.

**-mørk**

## B36-fløga á marknaðin

Fyri triðju ferð kemur nú ein B36-fløga á marknaðin. Hesa ferð er tað manningin handan Showmenn, sum saman við Terja Rasmussen hava staðið fyri útgávuni. Teir fýra, sum manna Showmenn eru James Olsen, Kim Hansen, Jens Marni Hansen og Rógvi á Rógvu.

Og í B36-høpi er talan sum so ikki um nakrar ársungar. Terji var longu partur av fløguni, sum varð send á marknaðin í 1996, og í 1999 var Kim Hansen maðurin handan næstu svørt/hvítu fløguna.

Nú er triðja fløgan so komin á marknaðin, og lítil ivi man vera um, at hendan fer at vera partur av jólapakkunum í nógvum heimum í høvuðsstaðnum.

**-mørk**